UTTAN ÚR HEIMI

## Estlendingar atkvøða

Sunnudagin verður fólkaatkvøða í Estlandi um limaskap í ES, og hóast estlendingar bera orð fyri at vera sera varnir, tykist eingin ivi vera um, at teir longu hava gjørt av, hvat úrslitið verður sunnudagin.

Sambært teimum seinastu meiningakanningunum fara góð 70 prosent at taka undir við limaskapi í ES, og tann avgjørda mótstøðan er at kalla eingin, tí tá høvdu umleið 20 prosent ikki tikið støðu. Úrslitið í Estlandi kann tí fara at líkjast tí í Litava, har heili 91 prosent atkvøddu fyri ES-limaskapi.

Bæði fakfeløgini og arbeiðsgevararnir hava mælt estlendingum til at taka undir við limaskapinum. Tey siga, at limaskapur í ES fer at tryggja framhaldandi búskaparliga framgongd. Tey flestu, sum eru ímóti at fara upp í ES, vísa á, at Estland fekk sjálvsstýri frá Sovjetsamveldinum fyri fáum árum síðani og eigur ikki at fara inn í eitt annað samveldið ístaðin fyri.

## Rindar endurgjald

Tað rómverskkatólska erkabiskupadømið í Boston í USA hevur gjørt av at rinda fleiri hundrað fólkum endurgjald fyri kynsliga misnýtslu.

Seinastu tíðina hava samráðingar verið millum kirkjuna og umboð fyri tey mongu, sum vórðu fyri kynsligum ágangi innan kirkjugátt, og nú eru partarnir vorðnir samdir um, at kirkjan skal rinda 85 milliónir dollarar í endurgjaldi. Sambært umboð-unum hjá teimum, sum vórðu kynsliga misnýtt, skal endurgjaldið býtast millum tey umleið 540 fólkini, sum hava lagt endurgjaldskrav ímóti kirkjuni.

Erkabiskupurin í Boston, Sean O'Malley, hevur staðið á odda fyri samráðingunum vegna kirkjuna. Hann tók við embætinum fyri einum mánað síðani, tá Bernard Law, kardinalur, noyddist frá orsakað av gøluni um kynsligu misnýtsluna. Tað kom eisini fram, at kardinalurin hevði verið vitandi um, at prestar hansara høvdu misnýtt børn og ung, men at hann hevði dult tað.

## Baskar krevja rættindi

Myndugleikarnir í spanska Baskaralandinum hava gjørt av at draga landsmyndugleikarnar í Madrid fyri evropeiska mannarættindadómstólin í Strasbourg, tí teir vilja vera við, at landsmyndugleikarnir hava brotið lógina við at banna baskiska tjóðskaparflokkinum.

Ein talsmaður hjá baskiska stýrinum sigur, at avgerðin hjá myndugleikunum í Madrid er brot á mannarættindasamtyktina um frælsi hjá fólki at skipa seg í felagsskapir, og at hon er eisini brot á regluna um, at øll eru líka fyri lógini.

Spanski hægstirættur setti í mars baskiska tjóðskaparflokkinum Batasuna forboð fyri at virka, tí flokkurin sambært rættinum hevur tætt tilknýti til tann víðgongda baskiska felagsskapin ETA. Leiðslan í Batasuna vísir aftur, at flokkurin er tann politiski vongurin á ETA, men tað er ein sannroynd, at flokkurin hevur ongantíð fordømt tær nógvu yvirgangsatsóknirnar hjá baskiska felagsskapinum.

## Bilrisar hóttir

Í mong ár hava amerikanarar keypt sínar bilar frá General Motors, Ford og Chrysler, men nú vísa tey seinastu sølutølini, at japanska Toyota hevur kroyst seg inn ímillum teir tríggjar risarnar og hevur skúgvað Chrysler niður á fjórða pláss.

Samstundis vísa hagtølini, at 57,9 prosent av teimum bilunum, sum amerikanarar keypa, eru frá teimum trimum stóru verksmiðjunum í Detroit, og so lítil hevur teirra partur av marknaðinum ongantíð verið fyrr.

Tey, sum fylgja við amerikanska bilmarknaðinum, siga, at tær amerikonsku verksmiðjurnar hava lagt alt ov stóran dent á at gera stórar bilar. Japanar hava harafturímóti hildið seg til teir smáu bilarnar, sum hava fingið størri og størri áhuga í USA. Nú verður hildið, at innan 2010 fer ein av teimum trimum stóru á húsagang ella á japanskar hendur.

# Blóðbaðið heldur fram

**Ísraelsmenn royndu at myrða andaliga leiðaran í Hamas. Svarið kom**

ÍSRAEL

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

- Vit fara at hevna royndina hjá Ísrael at beina fyri Sheikh Ahmed Yassin, svór felagsskapurin Hamas, tá ísraelsmenn fyri nøkrum døgum síðani royndu at beina fyri andaliga leiðaranum í tí víðgongda felagsskapinum.

Og hevndin kom. Fyrrakvøldið kravdu tvær sjálvmorðsbumbuspreingingar í Tel Aviv og Jerusalem ellivu mannalív.

Hamas átók sær ábyrgdina av báðum og segði atsóknirnar vera hevnd fyri ísraelskan ágang. Ísraelska stjórnin gav Yasser Arafat skyldina, tí hann hevði forðað palestinsku myndugleikunum at taka vápnini frá Hamas og øðrum víðgongdum felagsskapum.

Í gjár vórðu tríggir palestinar, teirra millum ein 13 ára gamal drongur, jarðaðir. Teir doyðu í einum ísraelskum álopi í Hebron. Teir báðir menninir vóru limir í Hamas, siga ísraelsmenn. Um somu tíð søktu ísraelsmenn at einum húsum í Gaza, har ein leiðari í Hamas var staddur, men hann slapp við lívinum.

Hamas hevur lovað hevnd. Blóðbaðið heldur fram.

# Politikararnir misnýta 11. september



*Ground Zero, har tey bæði WTC-tornini stóðu, er heilagur staður, men verður misnýttur til politisk áhugamál, siga avvarandi hjá fleiri, sum doyðu har fyri tveimum árum síðani*

*Mynd: Reuters*

**Fleiri avvarðandi hjá teimum, sum doyðu í World Trade Center fyri tveimum árum síðani, leggja politikararnar undir at misnýta dagin**

11. SEPTEMBER

*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Myndugleikarnir í New York skipa fyri almennum minningarhaldi í dag til minnis um tey, sum doyðu á atsóknini 11. september í 2001.

Men øll tey avvarandi verða ikki har. Fleiri teirra hava gjørt av at skipa sítt egna minningarhald á Broadway.

- Tað harmar okkum, at Ground Zero, har leivdir av fleiri av okkara kæru framvegis eru, ofta verður nýtt sum ein politiskur pallur. Tað besta hevði verið, um øll valevni hjá øllum flokkum hildu seg burtur haðani, sigur Andrew Rice, sum misti bróðurin í World Trade Center.

Um mánaðar-skiftið august-september næsta ár fer republikanski flokkurin at halda sítt endaliga uppstillingarfund til forsetavalið. Andrew Rice sigur seg vóna, at politikararnir ikki fara at nýta sorgardagin fyri tveimum árum síðani til egið gagn.

- Staðurin, har tey bæði tornini stóðu, er heilagur, og hendan vikan er heilag fyri okkum, sigur hann.



UTTAN ÚR HEIMI



# Óttast ógvusliga atsókn á tvey ára degnum í dag

**Í dag eru tvey ár síðani yvirgangsatsóknina at New York og Pentagon, og amerikanarar óttast fyri einum ógvusligum álopi á tvey ára degnum**

11. SEPTEMBER

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Fyri fýra mánaðum síðani var fundur einastaðni í fjøllunum nærhendis markinum millum Afghanistan og Pakistan. Har hittust fleiri av teimum ringastu yvirgangsmonnunum í heiminum at leggja ætlanir um komandi atsóknir. Millum fundarluttakararnar var sjálvur leiðarin í felagsskapinum al-Qaeda, Osama bin Laden.

Hesar upplýsingarnar eru úr einari grein í amerikanska tíðarritinum Newsweek. Greinina hava teir báðir tíðindamenninir Ben Yousafzi og Ron Moreau skrivað, og hon hevur vakt stóran ans í USA. So stóran ans, at samveldisløgreglan FBI hevur sent øllum amerikanarum bæði í USA og uttanlands eina ávaring um at ansa sær.

Ein ónevnd kelda í FBI sigur við tíðindastovuna AP, at tað er ikki óhugsandi, at al-Qaeda fer at royna seg hesaferð við einum eiturálopi á drekkivatnið í einum ella fleiri amerikonskum stórbýum. Talan kann eisini verða um at koyra eitur í matvørur. Amerikanarar bera serliga ótta fyri, at yvirgangsmenninir kunnu fara at nýta eiturevni sum solanin ella nikotin. Fólk kunnu gerast ógvuliga sjúk av hesum evnum, og tað er komið fram, at amerikanskir agentar í Afghanistan hava funnið skjøl, har hesi bæði evnini verða umrødd sum møgulig vápn í einum eiturálopi á USA.

### Flogfør og bumbur

Sambært Newsweek halda amerikonsku myndugleikarnir, at al-Qaeda hevur ikki slept ætlanini um at fremja eina atsókn at USA, og at hendan atsóknin verður uppaftur ógvusligari enn tann fyri tveimum árum síðani.

FBI og tað serliga ráðið fyri landsins trygd ávara eisini um, at yvirgangsmenninir kunnu fara at nýta bilbumbur - ikki persónbilar, men lastbilar. Teir halda seg eisini vita, at hóast trygdartiltøkini í flest øllum floghavnum eru herd munandi, hevur al-Qaeda ikki slept ætlanum um at ræna flogfør og at nýta tey sum rakettir ímóti stórum bygningum ella orkuverkum. Sjálvmorðsbumbumenn ella -kvinnur eru eisini ein møguleiki, sigur FBI.

Al-Qaeda hevur eftir øllum at døma eisini givið ljóð frá sær og ávarað amerikanararnar. Á einum ljóðbandi, sum arabiska sjónvarpsstøðin Al-Arabiyya spældi seinasta sunnudag, og sum eftir øllum at døma var komið frá al-Qaeda, varð ávarað um eina yvirgangsatsókn, sum verður nógv verri enn tann fyri tveimum árum síðani.

- Vit kunngera hervið, at tað koma nýggjar atsóknir í og uttan fyri USA, og at tær fara at fáa amerikanarar at gloyma álopini tann 11. september í 2001, varð sagt á bandinum.

### Bin Laden á lívi

Men greinin í Newsweek hevur eftir øllum at døma elvt til størri ótta í USA enn ljóðbandið hjá al-Arabiyya, tí sambært greinini er Osama bin Laden framvegis á lívi og saman við sínum næstu monnum.

Teir báðir tíðindamenninir hjá Newsweek hava verið í fjallalendinum í Afghanistan, har teir hava tosað við fleiri Taliban-leiðarar. Allastaðni fingu teir at vita, at bin Laden er á lívi, og at hann heldur til í fjøllunum.

Tað var ein av Taliban-leiðarunum, sum visti at siga frá fundinum í apríl, og ein annar Taliban-leiðari visti at siga, hvat tosað varð um.

- Hann ætlar sær at nýta lívfrøðilig vápn hesafsrð. Tað næsta álopið hjá Osama verður ógvusligari, enn ein kann ímynda sær, segði Taliban-leiðarin teimum báðum tíðindamonnunum.

Ei undur í, at amerikanarar óttast.